miðvikan
Nr. 43 • 3. mars. 2010
Síðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Evensenættin:**

# Skiparin fyrsti maður av søkkandi skipinum

**Í umrøðuni av Müller og Evensenættunum eru vit komin til Christian Evensen, sum var ein framúr sjómaður, men sum eisini á sín hátt gjørdi seg galdandi sum reiðari**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**7. partur**

Henda røðin byrjaði við at umrøða føroysku kolonistjórarnar í Grønlandi um næstseinasta aldarskifti. Tað er eingin ivi um, at hetta hava verið framúr fólk, sum eisini hava havt eina spennandi ætt. Hesar ættir fara vit at umrøða í trimum Miðvikum.

Johan Evensen var sum kunnugt ein av hesum kolonistjórum. Í røðini Hendur ið Sleptu hava vit umrøtt foreldur hansara Amalia Sofía og Jóan Petur, systkin hansara Jens, giftur við Karen Mortensen, Sofus og Maren Margrethe, gift við Jens Mohr.

Ein beiggja, Søren Christian, føddur 1866 veit ættin einki um, utttan at konan æt Augusta Klein, og at hann átti børn í Amerika.

Eftir at umrøða er so Christian Marius f. 21.6 1872, og her skal frá ymsum keldum, eisini í ættini, lýsast tað, sum er tøkt um hann.

## Forlisti tvær ferðir í tríggjar mánaðir

Veturin 1906/07 sukku undir Íslandi tvey av teimum ferðafólka- og farmaskipum, sum røktu siglingina millum Føroyar, Ísland og Danmark. Christian var við báðum teirra sum stýrimaður.

Kong Inge fórst 22. desember 1906 við Flatoynna inni í Breiðafjørðinum á vesturlandinum í Íslandi. Manningin varð bjargað. Tann 22. mars 1907 fórst Kong Trygve hjá sama reiðarí við Langanes.

Christian vaks upp sum keypmans- og reiðarasonur og hevur fingið hug til sjógvin. Tað kann hugsast, at hann hevur fingið stýrimansprógv í Danmark. Tað fekst so ikki í Føroyum tá.

Tingakrossur gjørdi serliga nógv burtur úr hesum seinna forlissinum hjá Kong Trygve.

Tað fyrsta sum frættist var, at skipið var farið, og lagnan hjá fólkinum umborð var óviss. Men skjótt komu tó tíðindi "Evensen bjærget velbefindende."

Tingakrossur hevði samrøðu við Christian Evensen, tá hann kom aftur til Føroya, og lýsir hann væl hesa hendingina:

## Dugnaligur og avhildin

I Søndags ankom vor dygtige og afholdte Landsmand, Hr. Christian Evensen, hvis tvivlsomme Skæbne de første Dage efter Kong Trygve's Forlis ved Island satte mange Sind i Bevægelse, her til Byen, efter Omstændighederne i god Helbredstilstand. Da de Oplysninger, der hidtil er fremkommet offentligt vedrørende dette Forlis, saa at sige udelukkende skyldes den forliste Dampers Kaptajn, opsøgte vi forleden Hr. Evensen med Anmodning om at give os en Fremstilling af det sørgelige Forlis' Historie og Forløb.

Det viser sig da ogsaa, at vor Landsmands Beretning stiller den triste Affære i en Belysning, som Kaptajn Jensens Meddelelse i de danske Blade ikke lod ane.



Søren Evensen er vist farin til Amerika. Men ættin veit einki um hann



Christian Evensen var ein framúr sjómaður

## Í havsneyð

Hr Evensen fortæller:

Det var Torsdagen den 21. Marts Kl. 3 Eftm, efter at vi havde passeret Langanes, at det begyndte at blæse op, saa Himmel og Hav snart stod i et, og Skibet nægtede at lystre Roret. Det var en fuldstændig Orkan, der var over os, og vi indsaa snart, at Faren var overhængende, og Kong Trygve sandsynligvis var hjælpeløst Fortabt. Vi søgte dog saa vidt vi kunne at holde os fri af Isen., men omkring Kl. 2½ om Natten hørte jeg, at Isen skruede, og kort efter strømmede Søen ind. Skottet var sprængt. Pumpen lod sig vanskelig betjene i den Stilling, hvori Skibet laa, og vi forsøgte derfor at tilstoppe Hullet med Kiler og deslignende, men det viste sig snart frugtesløst. Skruen var da ogsaa ødelagt.

Jeg saa nu ingen anden Udvej end at gøre Baadene klare, men dette mente Kaptajnen kunde ikke nytte noget. Imidlertid gav jeg Ordrer til at sætte Baadene i Søen, fik samlet en hel del Proviant, Brød, Æbler, Konserves o.s.v., hvoraf langt det meste anbragtes i Styrbords Redningsbaaden, der først blev sat ud.

## Skiparin fyrstur av skipinum

I den Baad kom Kaptajn Jensen, der saaledes var den første af Officererne, der forlod Skibet. Han fik Baadsmanden og en Letmatros med sig foruden en del kraftige unge Passagerer. De to andre Baade var med stort Besvær gjort klare, og dem mandede 2. Styrmand og jeg. Han den mindre med 5 Mand, mens jeg havde 13 Mennesker indenbords.

Nu gjaldt det om at slippe gennem det Isbælte, der omgav Skibet. Jeg opdagede en lille Aabning i Isen og gjorde nu Tegn til de andre om at følge os. Kort efter passerer Kaptajnens Baad forbi os uden et Ord, sætter Sejl til, og er ude af syne efter faa Minutters Forløb.

Imidlertid sad den mindste Baad fast i Isen, og da jeg ikke vilde forlade den, laa vi og ventede til det endelig lykkedes den at komme løs og frem



Vit hava ikki funnið nakra mynd av Kong Trygve. Men Ceres hjá DFDS kann hava verið eitt líknandi skip